**9.b flokkur**
**Miðvágs- Sandavágs skúli**

Til Løgtingið

**Ungdómstingmál nr. 8/2012: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um valrætt og valbæri**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Løgtingið**

**§ 1**
Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 114 frá 5. september 2011, verður gjørd henda broyting:
Í § 2, stk. 1 verður "18" broytt til "16".

**§ 2**
Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Viðmerkingar**
Við hesum uppskoti verður valrættaraldurin broyttur frá 18 til 16 ár.

Tá ið Løgtingið varð endurstovnað, og føroyingar skuldu á val, varð vælrættaraldurin ásettur at vera 30 ár. Umframt hetta vóru tað einans mannfólk, sum áttu ávísa ogn, sum sluppu á val. Hetta var í 1852. Í 1854 var valrættaraldurin lækkaður niður í 25 ár, men ognartreytirnar vóru framvegis galdandi, og tað vóru framvegis bara menn, sum sluppu á val. í 1918 var valrætturin gjørdur almennur soleiðis, at ognartreytirnar vórðu tiknar av, og kvinnurnar sluppu eisini á val. Í 1970 varð valrættaraldurin settur niður í 20, og í 1987 var hann settur niður í 18 ár.

Frá 1852 til 1987 er vælrættaraldurin lækkaður úr 30 niður í 18 ár. Samfelagið broytist, og støðan hjá demokratinum hevur lagað seg til vælrættin. Vit meta, at tíðin er komin til, at valrætturin verður settur niður í 16 ár.

Tað hevur verið ført fram, at tey ungu eru ov óbúgvin/óvitandi til at taka politiskar avgerðir og fara á val. Valrættur hevur einki við búning ella vitan at gera, men hevur nakað at gera við at taka støðu. Í vallógini er einki krav um at vera búgvin politiskt ella hava serstakan intelligens fyri at taka eina politiska støðu.

Samfelagið er broytt nógv síðan 1987. Tað verður væntað av teim ungu, at tey taka avleiðingar sum vaksin, og tey krøv, sum samfelagið setir teim ungu, eru ikki í samsvari við, at vælrættaraldurin er 18 ár. Sum dømi um hetta kann nevnast, at vit longu í 8. flokki í fólkaskúlanum skulu velja fak, sum kunnu fáa avleiðingar fyri restina av lívi okkara. Annað dømi er arbeiðsmarknaðurin. 16 ára gomul eru vit flest øll í størri ella minni mun knýtt at arbeiðsmarknaðinum. Har eru ongar sersømdir fyri ung, annað enn at vit fáa minni løn.

Viðvíkjandi tí kriminella lágaldrinum, so er eitt vanligt prinsipp í demokratinum, at fólkið sjálvt skal gera av, hvørjum lógum tey verða dømd eftir. Í lógaverkinum verður hildið, at vit eru nóg vaksin at verða dømd sambært lóg, tá ið vit eru 16, men samstundis skulu vit bíða, til vit eru 18, áðrenn vit kunnu ávirka, hvussu lógirnar verða. Vit halda, tað vera beinleiðis ódemokratiskt og órættvíst, at vit eru nóg vaksin at dømast, og átti tað tí at verið minsta krav, at vit eru nóg vaksin til at gera av, hvussu lógin skal verða.

Vit meta tað vera eins órættvíst at seta 18 ára aldursmark í dag 2012, og tað var at seta ognarteytir í 1852.

Umboðandi demokrati:
Í flest øllum londum hava vit umboðandi demokrati. Umboðandi demokrati er, at allir partar í landinum sleppa at velja umboð - í prinsippinum vil tað eisini siga, at allir aldursbólkar í landinum skulu umboðast.

Vit meta, at við at geva teimum ungu valrætt, fer tað at styrkja demokratisku støðuna, og tað fer eisini eggja teim ungu til at hava størri áhuga fyri politikki.

Ein gallupkanning, sum varð gjørd í september í 2009, vísti, at greiður meiriluti av danska fólkinum heldur, at tíðin er komin at broyta valrættaraldurin. Tíverri er ein samsvarandi kanning ikki framd her á landi enn, men helst hevði úrslitið verið tað sama.

Við vón um siðiliga viðgerð.

**Á Løgtingi, tann 6. februar 2012**

Anna Nolsøe Joensen    Hanus í Horni Nielsen    Guðrun Johnsdóttir